Frakland - Føroyar:

# STØRSTA AVBJÓÐINGIN NAKRANTÍÐ

**HM-undandystirnir millum lítlu Føroyar og fótbóltsrisan Frakland verða størstu og torførastu avbjóðingar higartil í føroysku fótbóltssøguni**



Víst hava mótstøðulið føroyinga í altjóða luttøku fyrr itið Spania, Týskland, Russland, Danmark, Rumenia, Jugoslavia o.s.fr., men ongantíð áður hevur føroyska landsliðið havt torførari uppgávu fyri framman, nú teir 11 fyrstu føroysku landsliðsleikararnir 8. sept. á Tórsvølli skulu standa andlit til andlits við stjørnur sum Zinedine Zidane úr Real Madrid, David Trezeguet úr Juventus og Thierry Henry, Robert Pires og Patrick Vieira úr Arsenal.

## Franska landsliðið betri enn nakrantíð

Franska landsliðið er í løtuni á øðrum plássi á altjóða FIFA styrkilistanum aftan fyri sambafótbóltin úr Brasilia á fyrsta plássi. Frakland gjørdist heimsmeistari í 1998 á heimavølli, har teir í finaluni sera sannførandi vunnu á Brasilia við trimum málum móti ongum, og í europameistarakappingini í 2000 í Hollandi og Belgia vann Frakland 2-1 á Italia í eini sera spennandi finalu og staðfestu harvið støðu sína sum besta landslið í Europa, sum teir til dagin í dag kunnu kalla seg hóast miseydnaða heimsmeistaraheitið í 2002 í Japan og Suðurkorea. Í løtuni sýnir franska landsliðið betri avrik enn nakrantíð við sera undirhaldandi, tekniskum og offensivum fótbólti.

## Spælistílurin ein trupulleiki

Júst hesin háttur fraklendinga at spæla fótbólt kann gerast ein stórur trupulleiki fyri føroyingar í heyst, tí hóast vit eitt nú bert taptu 2-1 og 0-2 móti varaheimsmeistarunum úr Týsklandi, hava vit nú við eina grundleggjandi øðrvísi fótbóltsmentan at gera. Lið sum Týskland og Skotland leika fótbólt, sum minnir um tann føroyska og tískil er lættari at laga seg eftir og verja seg ímóti hjá føroyska liðnum, og júst hetta hevur søgan prógvað. Hvussu ofta eru Føroyar ikki eyðmýktar við stórtapum og tennisúrslitum móti tekniskum, kombinatiónsleikandi londum sum Jugoslavia, Russlandi, Rumenia o.ø., júst tí hesi hava ein spælistíl, sum fellir føroyingum torførari at fyribyrgja? Hetta hóast hesi lond als ikki í styrki kunnu sammetast við t.d. Týskland, sum vit jú mundu fingið javnleik ímóti, um Hjalgrím Elttør bert hevði…

## Superstjørnur

Júst sama trupulleika stendur føroyska fótbóltstjóðin yvirfyri í dag móti einum fronskum liði, sum er so eyðkent av kreativum, tekniskum, offensivum sjampagnufótbólti við stóra kreatørinum Zinedine Zidane á odda. Aftan fyri hann ruddar ævigi stríðsvognurin Patrick Vieira upp, meðan Frakland við áleyparunum Thierry Henry og David Trezeguet hevur alt, ein venjari kann ynskja sær: Ómenniskjaligan skjótleika, dribliteknikk, evnir at skapa og skjóta mál, luftstyrki o.s.fr. Eins og Zidane er Robert Pires eisini upphav til mong mál á franska landsliðnum við sínum frálíku teknisku styrki. Umframt hesar superstjørnur skulu føroyingar eisini fáa tamarhald á Claude Makalele úr Chelsea, Bixente Lizarazu úr Bayern Munchen, Lilian Thuram úr Juventus og møguligum avloysarum í álopinum sum Louis Saha, Steve Marlet, Djibril Cissé og øðrum.

## So er bert at vóna

Hóast ein ræðumynd ikki eigur at verða málað frammanundan, stendur størsta fótbóltsuppgáva føroyinga nakrantíð fyri framman, tá føroysku leikararnir verða heimsøktir av bestu fótbóltsartistunum í heiminum, og so er bert at vóna…

*Heini í Skorini*

# KOMANDI LANDSDYSTUR ÍMILLUM FØROYAR OG FRAKLAND TÓRSVØLLI

**Landsdystur: Føroysku dreingirnir contre Les Bleus**

Í dag er hin sjeyndi september 2004. Klokkan er júst vorðin 15.00, og dómarin bríkslar dystin ímillum Føroyar og Frakland í gongd.

*Rúni H. Olsen og Jóannes Lamhauge.*

Í dag er hin sjeyndi september 2004. Klokkan er júst vorðin 15.00, og dómarin bríkslar dystin ímillum Føroyar og Frakland í gongd. Veðrið hevur hildið sær í allan morgun og útsýnið er gott henda lagnudag. Fullsett er á Tórsvølli, og fólkið er á gosi. Spenningurin hongur so tættur í luftini, at næstan ber til at klúgva hann við knívi. Teir føroysku leikararnir í teimum vælkendu hvítu landsliðstroyggjunum seta dystin ígongd, og áskoðararnir fara upp at kóka. John Petersen hevur spælt bóltin yvir til Christian Høgna, ið síðan ger eitt legg yvir í høgru síðu til Jákup á Borg. Hann temur bóltin væl, men so kemur ein stórleypandi Patrick Vieira í bláari troyggju, og við einari harðligari takling kvettir hann bóltin frá Jákupi. Hann sendir síðan bóltin fram við einum ovfarnum Juliani Johnson til Thierry Henry, ið stendur ytst í vinstra borði. Hann temur bóltin og sendir hann síðan inn í brotsteigin, har David Trézeguét er klárur við høvdinum. Men Jákup Mikkelsen hongur í leysari luft og bjargar í stórum stíli.

## Lutakastið

Hin 5. des 2003 varð trekt um, hvørji lið komu í bólk við hvør øðrum.

Spenningurin var stórur í stovunum kring landið, tá ið beinleiðissendingin við lutakastinum varð varpað kring allan heimin.

Bólkarnir gjørdust átta í tali, við seks og sjey londum í hvørjum. Í bólki saman við Føroyum komu Ìrland, Sveis, Kypern, Ísrael og so Frakland. Tað var serstakliga tað seinasta, ið vakti stóran ans ímillum føroyingar. Frakland eru jú fyrrverandi heimsmeistarar og núverandi evropameistarar. Ein hópur, ið nærum bert er samansettur av elituspælarum úr kendastu liðunum í heiminum, eitt nú Real Madrid, Arsenal og Juventus. Kremi av kreminum, um ein skal mæla við fáum orðum.

## Vanir at sigra

Fransmenn hava í mong ár verið millum bestu liðuni í heiminum. Hvør minnist ikki, tá fransmenn gjørdust evropameistarar við einum 2-1 sigri á Italia? Men hetta er ikki tað einasta, ið fransmenn hava at reypa sær av: Ígjøgnum tey seinastu árini hava fransmenn átt eitt hav av elituleikarum. Platini, Tigana og aðrir rúnabundu áskoðararnar við framúrskarandi, álopssinnaðum fótbólti í 80'unum.

Men óivað størsta bragd teirra man vera lagnudagin 12. juli, tá fraklendingar við einum brennandi 3-0 sigri bastu táverandi, og núverandi, heimsmeistarunum, Brasil.

## Ætla at berjast sum fyri lívinum

Føroyska landsliðið fekk fyri einari tíð síðan nýggjan venjara, nevniliga danan, Henrik Larsen, ið er fyrrverandi danskur yrkislandsliðsleikari. Hann hevur higartil víst bæði góðan ítróttaranda og góð úrslit. Samanumtikið kunnu vit øll vera samd um, at tað at velja júst hann til venjara, var eingin pattleikur.

At føroyingar skulu møta fraklendingum í fótbóltsdysti kann sjálvandi líkjast dystinum ímillum Dávid og Goliat í forum.

Men vit hava fyrr prógvað, at vit væl kunnu standa ímóti, tá ið harðast leikar á. Hvør minnist jú ikki megnar úrslitið vit fingu í Landskrona á sinni?

Og fyri ikki at gloyma javnleikin føroyingar leiktu ímóti skotum herfyri.

## 12. maður ger nógv burturúr dystinum

Ein fastur táttur hjá fjepparafelagnum, 12. maður, hevur verið at skipa fyri ymsum tiltøkum, tá landsdystur er í Føroyum. M.a. verður upphiting áðrenn dystin við máling í Eclipse, sum ætlanin er at leiga.

Men eisini fraklendingar eru ídnir fótbóltsfjepparar. Væntað verður, at minst 600 franskir áskoðarar fara at koma hendavegin, og helst vilja teir allir verða væl harðmæltari enn føroyingar.

Fótbóltssamband Føroya væntar, at dysturin ímillum Føroyar og Frakland niðri í Fraklandi møguliga verður leiktur í franska stórbýnum, Lyon.

Franska landsliðið er tá á heimavølli, og kann avbjóðingin tá tykjast føroysku dreingjunum eyka stór.

Men trúgvu føroysku fjeppararnir ætla tá ikki at smæðast burtur. 12. maður hevur nevniliga stórar ætlanir um at skipa fyri eini ferð, har føroysku áskoðararnir fáa møguleikan at verða við til eitt risastórt fótbóltstiltak sum ongantíð áður. Og munnu vit ikki fara at síggja ein kátan Oskar, díkjandi á trummu sína, rópa "koyr á Føroyar!!!"?

## Innkast til Føroyar..

Jann Ingi Petersen hevur fingið bóltin, men missir hann av einum í so harðligum Phillipe Mexés, ið tykist at koma ongastaðni frá. Bólturin rullar út um linjuna. Linjuverjin hevur reyðgula flaggið á lofti og siktar kaldliga ímóti føroysku hálvuni.

Jann Ingi kastar bóltin fram um Helga L. Petersen, ið rennir um kapp við Thuram. Helgi rekur inn í franska brotsteigin, men fraklendingar tola ikki álopshugin hjá føroyingum, so teir fella Helga.

Helgi verður liggjandi, og rok verður á vøllinum.

Dómarin er á staðnum, og her er ongin ivi.

- "Brotsspark!", geylar Jógvan Arge hásur á málinum,

"Tað er brotsspark til føroyingar!!"

Føroysku áskoðararnir eru á gosi, og kátu fransmenninir gjørdust nú brádliga heilt hvítir í andlitinum.

John Petersen leggur bóltin stillisliga á brotssparksblettin, og allur Tórsvøllur situr sum á nálum. Tigandi.

John Petersen stendur eina lítla løtu og slotar, men mannar seg síðani upp og ger eitt renningarlop og langar til. Franski málmaðurin, Barthéz, hevur ongan møguleika. Hann tveitir seg, men velur skeiva síðu. Hann hoyrir bert súsið av bóltinum, ið fer syngjandi framvið. Hann blundar og roynir at taka rómin hjá føroysku áskoðarunum í røttum ítróttaranda.



# OH, EG ELSKI TYKKUM!

**Stefanie E. Sager er skiftisnæmingur úr Sveits. Hon gongur nú í 2.ð á studentaskúlanum í Hoydølum. Vit hava her sett henni nakrar spurningar um tíð hennara í Føroyum, og hvussu henni dámar land okkara**

**Hví Føroyar?**

Upprunaliga ætlaði eg mær at fara til okkurt land í Skandinavia. Eg las eina bók um Skandinavia og kom fram á Føroyar. Hetta landið hevði eg ongantíð hoyrt nakað um, jú fótbóltsliðið hoyrir man onkuntíð um.

Hetta, sum eg las um Føroyar, helt eg vera øgiliga spennandi. Tað virkaði sum ein lítil verð, mitt í havinum, við einari ríkari mentan, og alt hetta ljóðaði øgiliga innbjóðandi, og eg angri slettt ikki, at eg eri komin.

**Hvussu leingi hevur tú nú verið í Føroyum?**

Nú havi eg verið her í 6 mánaðir. Og tað er løgið at hugsa sær til, at so nógv tíð longu er farin, tí eg havi upplivað so nógv, meðan eg havi verið her.

**Hvussu var í byrjanini?**

Tær fyrstu vikurnar vóru ræðuligar. Eg longdist so illa heim, og eg skilti einki. Eg kendi ongan, og eingin var, sum visti hvussu eg hevði tað. Men tá eg byrjaði at læra málið, gekk nógv betri.

Tað, at skilja fólk, hevur øgiliga nógv at siga. Man veit ikki, hvat fólk hugsa, ella hvussu fólk eru, tá man ikki skilur málið. Og umvent.

**Er tað lættari nú?**

Ja! Nú dugi eg eitt sindur føroyskt, og eg føli meg heima. Eg føli meg ordiliga heima.

**Leingist tær heimaftur?**

Nei. Ikki meir. Tað er løgið at hugsa sær til, at eg einaferð skal heimaftur. Tí mær dámar so væl her.

Men lívið í Sveits dámar mær eisini væl. Eg hevði viljað, at man hevði kunnað koyrt hesir báðir ymisku heimarnar saman í ein.

**Hvat dámar tær ta føroysku mentanina og tað føroyska fólkið?**

Eg haldi, at Føroyar hevur eina ógvuliga spennandi og spesiella mentan. Tit eru ikki so ávirkaði frá umheiminum, sum t.d. Sveits er. Tit hava enn traditiónir, sum føroyskan dans og grindadráp.

Eitt annað, sum mær dámar so væl við Føroyum er, at øll kenna hvønn annan. Um man fer oman í býin við onkrum, so ganga øll og siga "hey" og heilsa uppá hvønn annan. Alt er so persónligt her.

Eisini eru øll í familju við hvønn annan. Eg havi lagt til merkis, at familjan hevur nógv at siga her, og familjan ger nógv saman.

Ì byrjanini var tað løgið at hugsa sær til, at Havnin er høvuðsstaður í Føroyum. Býurin er so lítil.

Í býnum eg komi frá búgva 60.000 fólk, og tað er ein lítil býur í Sveis.

**Hvat er tað besta upplivilsi, tú hevur havt í Føroyum?**

Tað er ringt at siga, tað er so nógv. Mær dámdi væl jólini. Eg var í Suðuroy hjá ommu og abba.

Tað var øgiliga hugnaligt, og øll familjan var har.

Eg gleði meg øgiliga nógv at fara við klassanum til Frankaríkis, og eg eri glað at sleppa við teimum.

Eg kann ikki siga, at tað er ein uppliving, sum hevur havt nógv at týða fyri meg. Tað eru heldur tey smáu tingini, lívið í Føroyum sum heild. Eg eri komin at kenna nógv fitt fólk, meðan eg havi verið her. Her er so deiligt, oh, eg elski tykkum!







AFS Føroyar
Altjóða ungdómsumskifti
Postboks 1351
110 Tórshavn
Tel 312991 / 422265
eholm@post.olivant.fo
www.afs.dk

Vertsfamiljur



søkjast til komandi skúlaár
juli 2004 – juni 2005



Húsrúm
Hjartarúm

Gev familju tykkara nýggjan íblástur uttan úr heimi

Áhugi fyri at lata ein útlendskan næming gerast partur av tykkara familju